Røða í sambandi við at Depilin fyri børn og ung við fjølbreki letur upp
Týsdagin 16. desember 2014 kl. 15.00
Gerðisvegur 5 í Runavík

*Góðu børn og ung, góðu foreldur og avvarðandi, leiðsla og starvsfólk, góða samkoma*

Í dag er ein stórur dagur. Ein dagur, sum vit leingi hava sæð fram til. Serliga hava tit, sum fara at hava tykkara gerandisdag her í Deplinum, og tit, sum fara at koma her til umlætting, og foreldur og avvarðandi tykkara, bíða spent eftir, at depilin skuldi gerast liðugur og klárur at taka í nýtslu. Tað sama hevur leiðsla og starvsfólk gjørt.

Og so standa vit her, í hesum nýggja, snotliga depilinum fyri børn og ung við fjølbreki, sum er bygdur til endamálið og eftir tørvinum hjá tykkum, sum fara at brúka depilin. Og tað er sanniliga ein góð kensla!

Fyri júst tveimum árum síðan, ein regnvátan og illfýsnan januardag, varð spakin settur í til henda depil. Eg minnist serliga væl henda dagin, tí hóast dagurin var bæði vátur og kaldur, og umstøðurnar á Gamla Reiðrinum, sum vit vitjaðu henda dagin, vóru alt annað enn nøkandi, var tað ein serliga góð og heit kensla at uppliva børnini og tey ungu á Reiðrinum og starvsfólkini, sum syrgdu fyri, at her var gott at vera. "Har tað er hjartarúm er húsrúm", verður ofta tikið til, og júst hesa kensluna, hevði eg eftir vitjanina.

Eisini var tað serliga fjálgt og gott at uppliva – henda óðveðursdag – at so mong fólk møttu upp, hóast vindur og regn, at verða við til løtuna, tá spakin var settur í. Tað er vist, at Reiðri hevur nógvar góðar stuðlar – bæði nær og fjar.

Fyri skjótt langari tíð síðan varð ásannað, at neyðugt var við betri hølisviðurskiftum og kørmum hjá Reiðrinum at virka undir. Gamla Reiðrið var eini keypt sethús, sum ikki var bygt til endamálið, tí onki annað var tøkt tá.

Óivað hava tit havt nógvar góðar løtur í Reiðrinum, men tað er ikki ov nógv sagt, at hølisviðurskiftini í Reiðrinum ikki vóru nøktandi og hartil ótíðarhóskandi. Tí hevur tað verið umráðandi at fáa bygt nýtt.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við ætlanunum um at byggja nýggja depilin her Runavík. Samstundis hevur ætlanin verið at fáa víðkað og ment tilboðini og fáa til vega nýmótans hentleikar, ið lætta um gerandisdagin hjá børnunum, teim ungu og starvsfólkunum.

Depilin skal, eins og Reiðri hevur verið tað frammanundan, bæði vera dagtilhald fyri børn og ung við fjølbreki undir og í skúlaaldri, og verða umlættingartilboð fyri børn og ung við fjølbreki úr øllum landinum.

Tilboðið er fjøltáttað, tí talan er um ein fjøltáttaðan bólk, har hvør einstakur hevur nógvar, krevjandi avbjóðingar í gerandisdegnum. Tí er tað bæði umráðandi og týdningarmikið, at vit veita hetta tilboðið, eisini soleiðis, at tit sum familjur trygt kunnu lata tykkara kæru koma her, tí her fáa tey góða røkt, stuðul og umsorgan, og her eru tey í tryggum og góðum hølum.

Henda byggingin byggir á tankan um inklusión, at bústaðir verða bygdir í bygdum øki, samsvararandi Bústaðarpolitikkinum, sum eg fekk handað í 2012.

Aðalmálið í bústaðarpolitikkinum er, at rúm skal vera fyri øllum. Áhugamál og tørvur hjá øllum borgarum skulu síggjast aftur í innrættingunum, sum verða gjørdar. Bústaðir skulu byggjast til endamálið og bústaðarpolitikkurin stuðlar undir inklusión – at ymisk fólk, sum hava ymiskan tørv, búgva saman, lið um lið.

Dentur er lagdur á at byggja ein depil, sum gevur góðar og virðiligar umstøður. Nýggi depilin er eitt stórt framstig, og eg gleðist saman við tykkum um, at tit loksins fáa góðar og virðiligar umstøður. Reiðrið var ein fyribilsloysn, sum tíverri hevur vart alt ov leingi. Tit hava øll, bæði børn, foreldur og starvsfólk, verið tolin, tí tit hava trúð uppá, at depilin fór at koma.

Nýggi depilin er snotiligur og ikki minst er hann bygdur til endamálið og eftir tørvinum. Eg ivist onga løtu í, at tit fara at trívast væl her í nýggja deplinum.

Eg fari at veita eina serstaka tøkk til leiðslu og starvsfólk, sum hava verið íðin í arbeiðinum at fáa alt at virka, hóast umstøðurnar ikki hava verið tær bestu. Uttan tað góða arbeiði, sum tit gera hvønn dag, hevði ikki borið til at veitt hetta tilboð, og fari eg at takka tykkum hjartaliga fyri tað.

Eg fari at takka bygginevnd, sum við innlitið og royndum hevur gjørt eitt stórt arbeiði at fyrireika byggingina. Landsverk fyri holla ráðgeving til bygginevndina og arbeiðið sum byggiharri. KBH, sum hevur staðið fyri byggingini og allar undirveitarar takki eg fyri væl úr hondum greitt og flott handverk. Arkitektar99 eiga eisini tøkk fyri at hava skapað og teknað depilin. Eg fari eisini at takka Løgtinginum og allari teirri politisku skipanini fyri at vísa verkætlanini vælvild og fyri vælvilja at játta pening til verkætlanina, og øllum teimum, sum hava havt ein virkan leiklut í at fáa hesa verkætlan gjøgnumførda.

Eg fari eisini at nýta høvi at takka Runavíkar kommuna fyri sín positiva innstilling,samstarvsvilja og vælvild í sambandi við staðsetanina. Her er nógv og gott virksemi her í Runavík, og hetta er av sonnum eitt inkluderandi samfelag, ið rúmar øllum.

Og nú tað stundar til jóla fari eg eisini at nýga høvi at ynskja tykkum øllum, sum eru komin saman her í dag, eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.

At enda fari eg at ynskja børnum, foreldrum, leiðslu og starvsfólkum her á Deplinum bestu eydnu og blíðan byr. Og loyvi mær enda við at lesa nøkur ørindi av vøkru yrkingini hjá Hans Andriasi Djurhuus, "Tey standa og vagga og tráa"

"Tey standa og vagga og tráa,
á akrinum stadnandi øks,
og deila hin bjartoygda dáa,
sum upp millum teirra vøks.

*... (og fjórða ørindi:)*
Men dáin stendur í iva,
og hann hevur ymsan lit:
"Eg havi væl loyvi at liva
her líka so væl sum tit."

Tá verða tey øks at tagna,
tí tað segði dáin satt:
Hvønn vøkstur Gud hevur fagnað,
og hvør eigur lívsins rætt!"

Takk fyri.

**Annika Olsen**
**Landsstýriskvinna í almannamálum**